## Gongur framá við samanlegging í Vágum



Sandavágs bygdarráð hevur viðgjørt kommunusamanleggingina, eftir at ein fólkaatkvøða vísti at fólk ynskja hetta. Í seinastuni hava fleiri fundir verið millum borgarstjórarnar í Miðvágs- og Sandavágs kommunum. - Sáttmálin varð lagdur fyri kommunustýrið innan summarferiuna til 1. viðgerð. Frammanundan fundin fingu allir kommunustýrislimirnir uppskotið sendandi, so møguleiki var hjá øllum at seta seg inn í sáttmálan, tað vóru ikki nógvar viðmerkingar til uppskotið á fundinum, sigur borgarstjórin í Sandavági, Rósa Samuelsen (myndin) við Vágaportalin. Í seinastu viku var fundur fyri allar bygdarráðslimir í Miðvági og Sandavági, har eisini Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna og Hilmar Høgenni, deildarstjóri í kommunudeildini, tóku lut. - Tað var ein sera góður og greiður fundur, har øll kundu koma til orðanna, sigur Rósa Samuelsen.

## Skúlin á Giljanesi málaður

Tað hevur verið harðliga tiltrongt, men nú er arbeiðið umsíðir liðugt. Tað er Tummas Michael Smith, sum hevur valt litin til skúlan. Poli Mohr Poulsen hevur staðið fyri hesum umfatandi arbeiði at mála skúlan. – Nú er hann eitt satt prýði á at líta, skrivar Vágaportalurin.

# Farvæl Carlton

**Fólk hjá Klaksvíkar kommunu vóru umborð á Pelicano, fyrrverandi Carlton í gjár og handaðu chilenum gávur og ynsktu teimum góða eydnu við skipinum**

CARLTON
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Ætlandi loysti fyrrverandi Carlton í Klaksvík í gjár og stevndi suður í hav. Ferðir úr Føroyum til Chili fer at taka tað mesta av einum mánaða*

*Mynd: Dávur Winther*



*Skiparin, Jorge Acevedo Parado (høgrumegin) og 1. meistari Luis Duran Concha, eru sera fyrikomandi*

*Mynd: Dávur Winther*

Einir 10 mans úr Chili vóru í gjár royndartúr við Carlton, eins og fólk eisini vóru frá góðkennandi myndugleikunum í Chili.

Nú chilenar eru í Føroyum eftir skipinum, hevur Klaksvíkar kommuna havt Dáva Winther, leiðara á mentanardeildini hjá kommununi, umborð á skipinum við heilsanum og gávum frá býnum, samstundis sum nýggju eigarunum hevur verið ynskt góða eydnu við skipinum.

Chilenar hava hinvegin takkað nógvar ferðir fyri blíðskap og vinarlag, sum teimum hevur verið víst á ferðini í Føroyum.

- Nýggi skiparin á Carlton, sum nú kallast Pelicano, Jorge Acevedo Parado og 1. meistari Luis Duran Concha, vóru sera fyrikomandi og gleddust um vakra býin. Meðan eg vitjaði umborð, vóru teir nakað upptiknir, tí góðkennandi myndugleikarnir úr Chili skuldu gera seg lidnar við pappírsarbeiði.

Dávur Winther sigur, at meðan hann vitjaði umborð, komu góðkenningarskjøl upp at hanga, eins og navnabroytingin var sjónlig.

- Manningin bar proviantin umborð, sum Kjølbroheilsølan læt teimum, og í allari rúgvuni var hópur av sodavatni frá Føroya Bjór.

Dávur Winther sigur, at chilenar søgdu seg gleða seg til ferðina, og teir takkaðu fyri gávur og øll góðynskir úr Føroyum.

Væntandi fer ferðin úr Føroyum til Chili at taka tað mesta av einum mánaða. Skipið loysti ætlandi í gjárkvøldið við 10 monnum umborð, samstundis sum trý umboð fyri góðkennandi myndugleikarnar í Chili fara heimaftur við flogfari.



*Neyðugt er at proviantera til eina so langa ferð*

*Mynd: Dávur Winther*

### Smáir brikkar

Manningin, sum sigldi við Carlton, hevði góða hýru, meðan alt gekk væl.

Í mars lýsti Føroya Fiskimannafelag mynstringarbann fyri sínar limir við Carlton, tí felagið metti ikki, at reiðaríið helt sáttmálan.

Skipið helt kortini fram at sigla við limum úr Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagnum.

Viðurskiftini millum Fiskimannafelagið og felagið aftanfyri Carlton komu ongantíð í rættlag aftur, og tískil komu limir FF's heldur ongantíð umborð aftur á skipið.

Nú er Carlton so seldur til Chili, og hesar hýrurnar eru fyribils burtur.

Sosialurin hevur tí spurt Jan Højgaard, um hann kennir seg at hava nakra ábyrgd av, at skipið ikki longur er í føroyska fiskiskipaflotanum.

### Eingin skuldarkensla

- Nei, eg beri onga skuldarkenslu av hesum, sjálvt um eg veit, at onkur hevur róð fram undir, at eg havi skyldina í, at skipið nú er selt. Hvørki eg sjálvur ella reiðarin, Hanus Hansen, kundu havt gjørt tað stóra við hetta, tí báðir eru vit bert smáir brikkar í spælinum hjá útlendskum kapitali í Føroyum.

Jan Højgaard sigur, at tað einasta, ið hann sum formaður í Fiskimannafelagnum gjørdi, var at verja sínar limir.

- Og tað er mín skylda, leggur hann aftrat í stuttari viðmerking.

# Góðtaka ikki verri lønarumstøður

FAS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun var álitiskvinnan umborð á Norrønu, Jovita Karasinska, á vitjan á Fiskimannafelagnum, har hon saman við øðrum av manningini er limur í Sjómannadeildini.

Jan Højgaard, formaður FF's, sigur, at tað, sum órógvar limirnar í Sjómannadeildini, eru broytingarnar í ymiskum skattalógum, sum løgtingið samtykti í vár til at koma í gildi 1. januar 2009.

Hetta eru broytingar, sum fevna um FAS-skipanina.

- Limirnir í Sjómannadeildini hava sitið og roknað uppá, hvat hesar broytingar koma at merkja fyri tey, og úrslitið er avgjørt einki at reypa sær av, leggur hann aftrat.

Hann vísir á, at landsstýrið sigur seg vera í holt við at gera broytingar í FAS-skipanini, sum hava til endamáls at tillaga okkum eina FAS-skipan, sum skal vera nøktandi hjá føroyskum skipum at vera í - og vera áhugaverd hjá útlendskum skipum at koma inn í.

- Men fyri limirnar hjá okkum verða hesar broytingar, sum koma í gildi 1. januar 2009, eitt stórt afturstig.

Jan sigur, at sambært limunum, sum nú hava roknað upp á hesar broytingar, koma tey, sum í dag tjena umleið 15.000 krónur, at hava eina minni nettoinntøku upp á 1200 krónur um mánaðin.

- Tey, sum tjena umleið 30.000 umborð á Norrønu í dag, fáa á leið tað sama eftir nýggju skipanini, meðan eitt nú skiparin, sum hevur eina uppafturs størri inntøku, kemur at tjena einar 20.000-30.000 meira um árið.

Jan Højgaard sigur, at Fiskimannafelagið fer at seta seg nærri inn í hesar ætlaðu broytingar, og felagið fer ikki at góðtaka verri umstøður fyri sínar limir í Sjómannadeildini.

Sosialurin fer at venda aftur til hetta mál í blaðnum mánadagin.